# Kirkjukórið Ljómur syngur í Suðuroy sunnudagin

Sunnudagin kl. 14 hevur Kirkjukórið Ljómur undir leiðslu av Dorte Tilma jólakonsert í Vágs kirkju.

Á skránni verður eisini Lusiugonga, og skúlabørn fara at syngja jólasangir.

Seinrapartin er kórið við í Tvøroyrar kirkju, tá ið jólini verða sungin inn kl. 16.





*Kirkjukórið Ljómur syngur í kirkjunum í Vági og á Tvøroyri sunnudagin*






# Spennandi søluframsýning

Í kjallaranum í Tórsgøtu 21 (har Tilhaldið húsast) er fram til jóla søluframsýning við hondgjørdum leirlutum og pløggum.

Tað eru tær báðar Wanja Petersen og Petsia Skibenæs, ið skipa fyri. Kjólarnar, niðurdeilarnar og blusurnar við tilhoyri hevur Wanja tilevnað. Petsia eigur leirlutirnar.

So ynskir tú tær øðrvísi klæði til jóla, er tað gott hugskot at fara inn á gólvið í 100 ára gomlu hølunum og keyp tær ein lekran kjóla. Ongin vandi er fyri at nøkur onnar gongur í tí sama sum tú á jólum, tí bara ein finst í hvørjum sniði.

Leirlutirnir hjá Petsiu eru framleiddir á serstakan hátt. Teir eru tíðarleysir og samstundis sermerktir. So eisini jólagávuna, tú hevur leitað eftir, finnur tú her.

Søluframsýningin er opin frá kl. 10.00–17.00.

**eirikur**

